## Ukraina nærri ES



Tað hevur vakt ans, at tann nývaldi forsetin í Ukraina, Viktor Janukovitj, valdi at leggja sína fyrstu uttanlandsferð til Bruxelles heldur enn til Moskva. Á tíðindafundi í gjár ásannaði Janukovitj, at samstarvið millum Ukraina og ES fer at hava ávirkan á samstarvið millum Ukraina og Russland. Formaðurin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, segði, at samstarv millum Ukraina og ES forðar ikki samstarvi millum Ukraina og Russland ella øvugt. Á fundinum viðgjørdu teir eitt uppskot um eina fríhandilsavtalu millum ES og Ukraina.

# Tekniskt brek á Smyrli umvælt til vikuskiftið



**Stabilisatorarnir á Smyrli verða nú umvældir og um vikuskiftið rigga báðir aftur**

SMYRIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey, sum hava siglt við Smyrli seinastu dagarnar, hava varnast, at hann hevur ikki verið heilt so friðarligur í sjónum, sum hann plagar.

Orsøkin til tað er tann einfalda, at annar stabilisatorurin er óvirkin í løtuni.

Men eykalutirnir komu til landið í gjárkvøldið og samstundis komu serfrøðingar frá verksmiðjuni eisini til Føroyar og teir eru nú umborð á Smyrli og gera umvælingina.

Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni, sigur, at tá ið vikuskiftið fer at nærkast, eru umvælingarnar lidnar og so virka báðir stabilisatorarnir aftur.

Tað er nú ein mánaði síðani at stabilisatorurin í bakborði gekk fyri og síðani hevur Smyril siglt við einum stabilisatori.

Tað hevur gjørt, at tá ið veðrið ikki er gott, hevur hann rullað eitt sindur verri enn hann plagar.

Rakstrarleiðarin sigur, at serfrøðingur frá verksmiðjuni vóru umborð á Smyrli og kannaðu málið og tað vísir seg at tað eru legur og ein bóltur, sum eru farin.

Hann sigur, at hetta eru slitlutir, sum farast við tíðini, men í hesum føri hevur tað víst seg sum um, at teir slítast skjótari enn væntað.

Tað kemst helst av at stabilisatorarnir verða lagdir inn og koyrdir út fleiri ferðir um dagin og tað er ikki vanligt.

Eftirsum hetta hevur víst seg at verða ein trupulleiki, bindur Strandferðslan um heilan fingur og skiftir lutirnar út á hinum stabilisatorinum samstundis.

Sostatt verða báðir stabilsatorarnir umvældir fyri at sleppa undan brekum aftur.

Søgur hava gingið um, at orsøkin til at stabilisatorurin fór, var, at yvirmaðurin á brúnni gloymdi at leggja teir inn, einaferð Smyril skuldi leggja at og at teir sostatt tóku í bryggjuna.

Men hetta avsannar rakstrarleiðarin. Hann sigur, at kavari kannaði stabilisatorin, men har var onki, sum bendi á, at hann hevði tikið í nakrastaðni. Hann heldur eisini, at høvdu teir tikið í, hevði skaðin verið nógv størri enn hann er.

*Smyril hevur bara ein stabilisator í løtuni og tað ger, at tað er ikki so makligt at sigla, tá ið veðri ikki er gott. Men nú eru bæði eykalutir og serfrøðingar komnir til landið*

# Ættarkærir føroyingar hittast til hugnaliga løtu

**Leygarkvøldið 20. mars verður hugnaligt tiltak fyri øllum, sum hava áhuga fyri ættargransking og siðsøgu**

ÆTTARGRANSKING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ikki yvir at dylja, at tað er ein hópur av fólki, sum hevur áhuga fyri ættargransking og siðsøgu.

Og leygardagin 20. mars verður høvi hjá teimum at hittast, tí tá verður skipað fyri hugnaligum tiltaki fyri øllum, sum hava áhugað fyri ættargransking og siðsøgu.

Tiltakið verður í skúlahøllini í skúlanum í Trongisvági og ætlanin er, at tað skal vara allan dagin.

Jonny Dimon og Torgir Strøm, sum eru tveir av fyrireikarunum, siga, at tiltakið er lagt soleiðis til rættis, at tað skal bera til hjá fólki norðanfjørðs at koma suður við Smyrli leygarmorgunin og sleppa norður aftur um kvøldið.

Smyril fer av Havnini klokkan sjey á morgni og sostatt byrjar tiltakið klokkan 10 um morgunin við morgunmati. Klokkan16 er døgverði, so at tey, sum ikki hava hug at gista, skulu lukkast norður aftur við Smyrli klokkan 18.30.

Umframt, at fólk fáa høvið at práta saman, har mesta prátið uttan iva mest verður um slag og slekt, verða eisini nakrir fyrilestrar á skránni, har áhugaverd fólk fara at tosa um ættargransking og fara at fortelja um ymiskt siðsøguligt.

Tað er kortini ikki heilt vist enn, hvørjir fyrilestrarhaldararnir vera.

Men fyri at vita, hvussu nógvum fólkum, morgunmatur og døgverði skal gerast til, er neyðugt at melda til.